# TILTØK

## Glyvra kirkja
Fríggjakvøldið 18. sept.
kl. 21: Náttarkirkjan

## Gudstænastur 20. sept.
**Havnar kirkja:** Kl. 11 Sonja Klein. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlarnar hjá Heimamissiónini.
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11 Ann D. Hansen. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlarnar hjá Heimamissiónini. Konfirmantarnir, sum skulu konfirmerast pálmasunnudag 2010, skipa fyri kirkjukaffi aftaná gudstænastuna.
**Vesturkirkjan:** kl. 11 Heri Joensen, altarg. Sunnudagsskúli undir gudstænastuni. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini.
**Argja kirkja:** kl. 11 Bergur D. Joensen. Altarg. Sunnudagsskúli undir gudstænastuni.Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini.
**Kirkjubøar kirkja:** kl. 12.30 Bergur D. Joensen.
**Christianskirkjan:** kl. 11. Sverri Steinhólm
**Leiti:** kl. 11 & í **Porkeri:** kl. 12 + útvarp, Patrick De Neergaard
**Gásadalur:** kl. 11 David Johannesen, altarg.
**Haldórsvík:** kl. 11 Theodor E. D. Olsen, altarg.
**Glyvra kirkja:** kl. 11 gudst. og sunnudagsskúli, Meinhard Bjartalíð, altargangur.
**Fuglafjørður:** kl. 11 Uni Næs, konfirmatión.
**Tvøroyri:** kl. 11 Jónsvein Bech, altarg.
**Øravík:** kl. 11 v/Símun Jacobsen
**Fámjin:** kl. 12.10 v/Símun Jacobsen
**Skála kirkja:** kl. 11 Henning Bøgesvang
**Sjóvar kirkja:** kl. 12 Henning Bøgesvang, altarg.
**Sandur:** kl. 12 Jákup R. Hansen
**Vestmanna:** kl. 11 Inga Poulsen Dam

## Adventkirkjan
Mikukvøldið kl. 19.30 fyrilestur v/ Børge Schantz um evnið: Gud - Allah; sami guddómur? Hvør er munurin á hesum báðum átrúnaðum?
Hóskvøldið kl. 19.30 fyrilestur v/ Børge Schantz um evnið:Kristus - Muhammed - sama týdning? Á hvønn hátt kemur muslimurin í Paradís?
Fríggjakvøldið kl. 19.30, fyrilestur v/ Børge Schantz um evnið: Bíblian - Koranin - sam í boðskapur? H vat er grundarlagið undir tí strangu shari'alógini?

## Ebenezer
Mikukvøldið kl. 19 Føðingardagur hjá Svenning av Lofti
Hóskvøldið kl. 12.30 Andakt kl. 20 Ungdómsmøti – Talari: Richard Schwartsson – Evni: Hin kristni og hægri lesnaður
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans – Talari: Jákup N. Olsen Kl. 12 Sunnudagsskúli kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti
www.ebenezer.fo

## Hebron á Argjum
Mikudag kl. 10 Kvinnur biðja fyri børnunum.
Kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Johannes Poulsen Áp. 28
Sunnudag kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Kl. 12.15 Møti, John Rajani talar

## Vitnið, Hvalba
Á møtinum onskvøldið kl. 20 tala Zacharias Zachariassen og Don Hinchcliffe. Øll eru hjartaliga vælkomin

## Frelsunarherurin Tórshavn
Mikudagin kl. 15 Bønarløta Kl. 19 Cellugruppa fyri kvinnur í Skótasalinum
Hóskvøldið Kl. 20 Heimaforbundið evni: Lovsongur, og vón um Himmalin. Kl. 20-21.30 Ungdómskvøld í salinum.
Sunnudagin Kl. 11 Halgunarmøti v/sunnudagsskúla kl. 18 Møti

## Frelsunarherinum í Vági
Hósdagin kl. 16 øvar barnakórið.
Fríggjadagin 18. sept. kl. 9.30 orðið á borið, fyri allar menn.
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli og morgunmøti. Kl. 18.00 evangeliskt møti vid Eddi Bech og Doretu Kærbech.

## Evangeliihúsið, Tróndargøta
Mikudagin kl. 17.15 barnakórið venur.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar um skapanina, kl. 20 Tema kvøld: Gud í stjørnufrøðini, Henrik Mellemgaard talar.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
www.gospel.fo

## Filadelfia, Landavegur 22
Mikukvøldið kl. 18 Delli, børn 3. – 6 fl.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/sunnudagsskúla, Sámuel Jacobsen talar.
www.filadelfia.fo

## Filadelfia Vágar
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Jógvan Steintún talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## KFUM og KFUK í Havn
Hóskvøldið Kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími við John Myllhamar.
Fríggjadagin 18. til sunnudagin 20. sept.: Kvinnulega á Klaksvíkar Sjómansheimi. Tekning neyðug á tlf. 311928 el. 211824. Ring og hoyr nærri.

## KFUM & K í Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Almu Bjartalíð Rúttarbók kap. 3.
Sunnudagin
kl. 14.00 Sunnudagsskúli
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18.00 Møti við Ebba Petersen. Innsavnan til útimissión. Kl. 21 Ungdómsmøti

## Lívdin *í Hoyvíkar skúla*
Fríggjakvøldið onki ungdómsmøti vegna legu í Nólsoy.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Á familjumøtinum "Prát við sunnudagsskúlan og tænastuleiðara, Hvat brennur tú fyri og hví?". Kl. 11.30 Samfelagsløta. Kl. 12 Á seinna møtinum talar Jens Wang um "Visjónir: Stóra myndin". Kl. 12 Sunnudagsskúli. Undir báðum møtinum verður barnaansing. Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo.
Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini í Lívdini.

## Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting. sí eisini heimasíðu okkara: www.saron.fo

## Aglow Suðuroy
Hóskvøldið kl. 19.30 verður møti í Frelsunarherinum í Vági. Susan H. Petersen leiðari fyri Aglow Horsens talar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar

## Getsemane, Stangaskákið 1
*Kvinnumøtir v/Lenu Løbner*
Fríggjakvøldið kl. 20 er kvinnumøti við Lenu Løbner.
Leygardagin kl. 14 er seminar fyri ungar kvinnur.
Leygarkvøldið kl. 19 er kvinnumøti við Lenu Løbner.
Sunnukvøldið kl. 18 er møti við Lenu Løbner. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

## Lívsins Orð
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti
Mikukvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti
Sunnudagin kl. 10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

## Keldan, *Skálafirði*
Mikukvøldið kl. 20 Møti við Eivind Frøen.
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Eivind Frøen.
Sunnudagin kl. 17. Møti við Eivind Frøen. Barnamøti kl. 17 Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo
Hjúnarbandsskeið við Eivind Frøen, verður í Kelduni 18-20. sept. Møguleiki at tekna seg á 742054/581512/ ella á tvorfoss@kallnet.fo

## Tórshavnar Hvítusunnusamkoman *Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18 Evangelisk møti "Ein nýggj byrjan". Øll eru vælkomin.

## Samkoman Immanuel,
*Brekkutún 5, Hoyvík*
Mikukvøldið kl. 20 Møti
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár og klokkan 21 ; Herur Jákups, ungdómsmøti
Sunnudagin kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla
Øll eru hjartaliga vælkomin
www.immanuel.fo

## Samkoman við Marknagil
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti
Øll eru hjartaliga vælkomin

## Meinigheitshúsinum í Havn
Mikukvøldið kl. 20 Felagskóri venur.
Hósdagin kl. 16-17 Venur gentukóri (8-14 ár).
Kl. 20 Ungdómsmøti
Leygardag kl. 13 Kvinnur í bøn. Í loftstovuni í Meinigheitshúsinum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/Summartómið í kambodja
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Sjómanskvinnuringurin í Sandavág
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum týskvøldið 22. sept. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar

## Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími. Evni: Matt. 4
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/Tom Skaale
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Snorra Brend, Hoyvík. Evni: Støður, ið skaptu sangir.

## Missiónshúsinum við Landavegin
Hóskvøldið kl. 20 møti
Sunnukvøldið kl. 18 møti

## Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti við Eivind Bech

## Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Mikudagin kl. 06:00 Bøn
Kl. 20:00 Bíbiltími.
Fríggjadagin kl. 21:00 Ungdómsmøti / NÁTTAR KIRKJA. Tala við Jógvan Højgaard, kórsangur, bønargonga, lovsangur v.m.
Sunnudagur kl. 17 Felagsmøti við Ranvu Langaard

## Missiónshúsið í Rituvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 19 Juniorringur.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Møti.

## Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Matt. 24,19-41.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Símin Joensen & fl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Møtið við Knút Larsen, Fuglafjørður
Øll hjartaliga vælkomin.

## Losjan í Havn
*Tinghúsvegur 18*
Hvønn fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

## Gongutúrur
Sunnudagin kl. 10: Hósvíksleitið-Árnadalstindur-Kollfjarðardalur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10
27. september kl. 9.30: Nólsoy, Farið verður við Rituna av Bursatanga kl. 9.30.

## Eysturoyar gongufelag
Suðuroyartúrurin í ár verður 18 -20 september. Farið verður av Havnini 18/9 kl. 18.30 og heimaftur av Tvøroyri 20/9 kl. 17.30. Gist verður á Hotel Øravík.

## Tilhaldið í Tórsgøtu
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið í Tórsgøtu, tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 9-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Vit hava ruddað bókasavnið, tí hava vit sølu av Føroyskum bókum í kjallaranum*
***Skeið í vetur:***
*Horn og beinarbeiði* mána- og mikudag kl. 9 – 12, Rasmus Nygaard
*Veving* mikudag kl. 9 – 12 Joana Bjarnastein
*Maskinbinding* mikudag kl. 9 – 12 Marita Guttesen
*Telduskeið* hósdag kl. 9 – 17 Páll Poulsen
*Matgerð* miku- og fríggjadag kl 10 – 13.30 Bjørk Hendriksen.
***Tilmelding í Tilhaldinum (byrjar í viku 40)***
Mikudagur
Kl. 15 Túrur fram við Sandá. Øll eru hjartaliga vælkomin. Randi og Elisabeth, fysioterapeutar
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð.
Hósdagur
Kl. 10 Fimleikur, Grete Ellingsgaard. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa: "en halv gul sol" Chimannanda Ngozi Adicie. Hittast 24. sept. Kl. 11. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
Fríggjadagur
Kl. 10 Opið hús
*Øll eru hjartaliga vælkomin. Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin*

## Tilhaldið Hugnin
hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin. Mánadagin 7. sept. Vit hyggja at myndum frá túrinum í Vágum.

## Pensionistafelagið í Havn
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Summarsteðgur er, og vit hittast aftur 9. september.
Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

## Eldrafelagið Nón
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Dagtilhaldið í Nólsoy
er opið mána- týs- og hósdag frá kl. 13 til 17.

## Dagtilhaldið Blákollan á Oyri
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

## Dagtilhaldið í Vági
Hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll vælkomin.

## Tilhaldið Sóljan
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag til hósdag
kl. 13.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.***

## Tilhaldið Hugnin
Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# MERKISDAGAR

## 70 ára føðingardagur
Mikudagin 16. sept. fyllir Svenning av Lofti sjeyti ár. Føðingardagurin verður hildin í Ebenezer hetta sama kvøldið. Byrjað verður kl. 18.45 við eini almennari og fjølbroyttari sangløtu.

## 75 ára føðingardagur
Fríggjadagin 18. sept. kunnu hjúnini Jytta og Magnus Magnusson Fuglafirði halda 75 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 85 ára føðingardagur
Leygardagin 19. sept. fyllur Justa Poulsen, Fuglafjørður (ættað úr Sumba) 85 ár. Tey ið ynskja at heilsa uppá Justu eru vælkomin til ein drekkamunn í missiónshúsinum í Sumba millum kl. 15-19.

## 90 ára føðingardagur
Hósdagin 17. sept. verður Hensia Jacobsen í Syðrugøtu 90 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 19. sept. frá kl. 13 til 18 í kjallaranum í Gøtu kirkju, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp
Mánadagin 28. sept. hava hjúnini Fríðbjørg úr Fugloy og Jógvan Páll Poulsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 2. okt. í Bygdarhúsinum í Lorvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleðast og halda dagin saman við okkum, verða biðin at siga frá á tlf. 456729 og tlf. 222994 ella fuf@olivant.fo í seinasta lagi 19. sept.

## Gullbrúdleyp
Leygardagin 19. sept. kunnu hjúnini Jacobina og Arnfinnur Setberg, Tórshavn halda gullbrúdleyp. Tey vera burturstødd.
setberg@kallnet.fo

## Gullbrúdleyp
Sunnudagin 27. sept. kunnu hjúnini Sigrid og Hans Martin Tausen á Argjum halda gullbrúdleyp. Tey, sum ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin til eina hugnaliga løtu við kakuborði í EvangeliihúsinumTróndargøta 36, frá kl 19 til 22.

## Brúdleyp
Leygardagin 19. sept. kl. 12.30 giftast í Nylars Kirkju, Bornholm, Eydna J. H. Jarnskor, Strendur og Kenneth Bjarnason, Vágur. Br.adr.: Sdr. Landevej 15, 3700 Rønne, Danmark.

## Brúdleyp
Leygardagin 19. sept. kl. 14 giftast í Kingo Kirken, Nørrebro, Keypmannahavn. Helene Pihl, Hillerød og Bárður Sigmundarson Hammer, Runavík. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Postgaarden, Lyngby.